# Vestmenningar br

## FM favorittarnir fóru við stásinum

**ÓLAVSØKUKAPPRÓÐUR** Einasta undantakið var, tá ið Vestmenningur tók ólavsøkusigurin fyri nøsini á FM vinnaranum Eysturoyingi

Tróndur Arge

Kappróður tá ið hann er bestur. Annað kann ikki sigast um teir báðar tímarnar, sum tað ólavsøkuaftan varð kappast á Havnarvág. Róðrarnir vóru seinkaðir í ein hálvan tíma, men tað gjørdi ikki mun, tí rógvarar og áskoðarar høvdu einki ímóti at hugna sær og at súgva góða hýrin til sín, nú hetta róðrarárið var um at vera liðugt.

Onkur heldur kanska, at hetta var prógv um, at tað eigur at vera kappast á styttsta teininum og ikki á 1500 og 2000 metra málinum. Hitt sjónarmiðið er, at tað ger kappróðurin uppaftur meiri fjøltáttaðan og ríkan, at tað viðhvørt verður kappast á øllum teinunum, og at tað á Ólavsøku og á onkrari av hinum stevnunum bara verður kappast á stutta teininum.

### Gullini

FM favorittarnir og vinnararnir vunnu allir á Ólavsøku – uttan Eysturoyingur. Vestmenningur streyk avstað við ólavsøkugullinum, men Eysturoyingur vann FM soleiðis, sum tað frammanundan varð roknað við.

Tvey feløg vunnu tvey FM. Tey vóru Argja Róðrarfelag og Kappróðrarfelagið NSÍ. Fuglfirðingar vunnu eitt FM, og eitt gullsett fór til Miðvágs. Og so er spurningurin, hvussu tað verður við gullinum í kappingini millum 6-mannafør við monnum. Páll Fangi vann fyri sjeyndu ferð og var harvið einasti báturin, sum sigraði á øllum stevnunum í 2010. Stigatalið sigur, at hetta ber eitt FM heitið til klaksvíkingar við sær, men sum skilst skal hesin spurningurin avgerast á skrivaraborðinum hjá Róðrarsambandinum.

Í barnaróðrinum endaði tað við, at Havnar Róðrarfelag vann bæði kappingina millum dreingir og gentur. Eftir Vestanstevnu søgdu vit, at Teistin av Argjum hevði vunnið kappingina millum gentubátar. Tað gjørdu vit út frá stigatavluni, sum hon tá sa út. Síðani tá hevur umróður av róðrinum á Norðoyastevnu verið millum Drekan og Teistan á Havnarvág. Tann róðurin vann Drekin, og tá ið Drekin vann aftur á Ólavsøku, er tað Drekin, sum er fyrsti meistari í barnakappingini millum gentur, og Títlingur hjá Havnar Róðrarfelag er fyrsti meistarin í barnakappingini millum dreingir.

Sosialurin og Portalurin ynskja øllum vinnarunum tillukku, og vit takka fyri eitt gott kappingarár!

*trondur@sosialurin.fo*



**10-MANNAFØR** Men hóast teir ikki vunnu ólavsøkuróðurin, so halda teir á Eysturoyingi ikki, at hetta skuggar yvir FM heitið, sum teir tryggjaðu sær á Ólavsøku

Tróndur Arge

Vestmenningar vóru teir, sum fegnaðust mest, tá ið síðsta skotið var latið av eftir síðsta kappróðurin á hesum sinni. Fyri triðju ferð í ár vóru teir komnir fyrstir á mál. Vestmenningur vann á Sundalagsstevnu í Hvalvík, á Fjarðastevnu í Vestmanna, og nú høvdu teir vunnið ólavsøkuróðurin.

Teir tríggir sigrarnir rukku kortini ikki til at vinna FM heitið, hóast vestmenningar tær fýra ferðirnar, teir ikki hava verið fremstir, hava verið næstfremstir. Um Vestmenningur skuldi havt tryggjað sær FM, so var treytin tann, at eisini Hoyvíkingur endaði frammanfyri Eysturoying á Ólavsøku. Tað gjørdi hann ikki.

Vestmenningar duldu ikki fyri, at sigurin á Ólavsøku kendist sum sera søtur biti, nú tað ikki eydnaðist at vinna FM.

Tað kundi kanska roknast við, at teir á Eysturoyingi hingu við nevinum, tá ið teir aftur komu á dráttin. Sjálvandi harmaðust teir um, at tað ikki eydnaðist teimum at vinna á Ólavsøku, men tað var eingin ivi, um teir skuldu havt tikið ímillum at vinna á Ólavsøku ella at vinna FM.

– Sjálvandi kennist tað sum størsti sigurin at vinna meistaraheitið. Tey, sum kappast, vilja altíð vinna. Nú eru vit meistarar, og vit eru serliga fegnir um, at tað eydnaðist okkum at vinna á Eystanstevnu á Skálafjørðinum, var viðmerkingin á dráttinum til reportaran í fínu beinleiðis kappróðrar sjónvarpssendingini hjá Kringvarpinum.

Havnarbáturin hevur vunnið FM trettan ferðir. Í ár hava Eysturoyingur og Vestmenningur hava